# ARB-Vegleiðing

## V-E012-1

Frálæra um arbeiði við epoxyharpiks og isocyanat

## 2002/09

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1134**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 317811**
**Fax.: + 298 314489**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

## *1. Øki og lýsing.*

Vegleiðingin fevnir um frálæru, ið samband við loyvi at arbeiða við teimum produktum ið nevnd eru í § 1, í kunngerð nr. 199, frá 26. marts 1985 (donsk kunngerð sett í gildi við kunngerð nr. 131, frá 7. okt. 1990, um epoxyharpiks og isocyanat v.m.).

Tann ið byrjar undirvísing, skal fyrst verða góðkendur av Arbeiðseftirlitinum. Góðkenningin er tíðaravmarka til 5 ár.

Góðkenningin kann takast aftur av Arbeiðseftirlitinum, um viðurskiftini ikki longur lúka treytirnar sambært loyvinum.

Arbeiðseftirlitið hevur í loyvisskeiðnum, eftirlit við frálæruni, fyri at tryggja, at treytirnar verða fylgdar.

## *2. Loyvishavarin.*

Arbeiðseftirlitið vil tryggja sær at loyvishavarin, ella tann í settur verður í starv sum frálærari hjá honum, hevur neyðugan førleika og vitan um frálæruna.

Frálærarin skal kunna skjalprógva, at hann hevur luttikið á einum góðkendum skeiði um epoxy (*Kursus i personlig sikkerhed ved arbejde med epoxyharpiks og isocyanat)*, á einum av donsku AMU skúlunum.

Frálærarin skal sýna pedagogisk evni undir frálæruni.

Loyvishavarin skal ráða yvir neyðugum útbúnaði til frálæruna.

## *3. Undirvísingin*

Hølini skulu verða ljós, rúmlig og skulu lúka ásetingarnar um undirvísingarhøli, eitt nú rýmingarvegir, hita og inniluftviðurskifti.

Mesta tal av næmingum skal verða 12.

Í einstøkum førum kann næmingatalið fara uppum 12, treytað av at frálærutímatalið hækkar tilsvarandi.

Frálæran skal í minsta lagi verða 12 tímar, tá næmingatalið er undir 13.

Stk. 2. Undirvíst verður í hesum viðurskiftum:
1. Framleiðslukunnleiki
2. Framleiðsluhandfaring
3. Persónlig vernd
4. Útinnan av arbeiði
5. Arbeiðsháttur
6. Óhapp- og skaðaviðgerð

Luttakarin kann aftaná skeiði arbeiða við epoxyharpiks og isocyanat og lýkur soleiðis krøvini í kunngerð nr. 131 frá 7. okt. 1990.

Tímaætlan og frálærutilfar skal góðkennast av Arbeiðseftirlitinum

### *4. Loyvisbræv*

Arbeiðseftirlitið umsitur loyvisbrøvini og útskrivar loyvisbrøv eftir innsendum skjølum í váttað eru av frálærara

Arbeiðseftirlitið tekur gjald sambært príslista fyri umsiting og útskrift av loyvisbrævið.

### *5. Gildi fyri vegleiðingina.*

Hendan vegleiðing kemur í gildi 26. juni 2002.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 26. juni 2002.

______________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)